## Grønlendingar drekka minni

Ofta verður sagt, at grønlendingar drekka illa, og at teir drekka nógv verri enn eitt nú danir. Men tað er ikki rætt. Tey seinastu tjúgu árini er rúsdrekkanýtslan í Grønlandi minkað sera nógv við tí úrsliti, at nú drekka grønlendingar minni enn eitt nú danir. Tað sigur grønlendska útvarpið. Tølini vísa, at fyri tjúgu árum síðani drukku grønlendingar 22 litrar av reinum alkioholi í part um árið. Í fjør var nøgdin 10,5 litrar. Gongdin í grønlendsku rúsdrekkanýtsluni fekk drúgva umrøðu á einari ráðstevnu í Ålandi í august, og grønlendsku myndugleikarnir fingu rós, sigur KNR.



## Blóðtøpp av strongd

Svensk gransking staðfestir, at strongd kann elva til blóðtøpp í heilanum, sum kann elva til heilaskaða og í versta føri kann vera lívshættisligt. Granskararnir, sum starvast á lærda háskúlanum í Gøteborg, hava tosað við nógv fólk, sum høvdu havt blóðtøpp í heilanum. Samrøðurnar vístu, at nógv tey flestu høvdu havt trupulleikar við strongd í eitt ár ella meiri, áðrenn tey fingu blóðtøpp. Um orsøkina siga teir svensku granskararnir, at fólk, sum líða av strongd, hava lyndi til at eta ósunnan mat og hava ofta ov høgt blóðtrýst. Teir mæla til fleiri kanningar, tí frágreiðingin kann eisini vera okkurt heilt annað, siga teir.

*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu og Jón Tórur Einarsson*

# Bleytari køka hesaferð

**Samanbera vit fíggjarlógina frá 2009 við fíggjarlógaruppskotið 2010, sær út til, at køkan er vorðin eitt sindur bleytari hesaferð. Uppskriftirnar eru roknaðar av játtanin í prosentum til hvørt einstakt ráð, so talan er um býtið av samlaðu køkuni. Eftir hesum at døma, sær út til, at Almannamálaráðið, Mentamálaráðið, Heilsumálaráðið og Fiskimálaráðið hava fingið meira, meðan hini ráðini mugu klára seg við minni parti av samlaðu fíggjarlógini**







### Køkan er størri

Samlaða køkan til útreiðslur, um vit samanbera fíggjarlógina 2009 við fíggjarlógaruppskotið fyri 2010, er 103 milliónir krónur hægri í 2010, um hugt verður burtur frá rentuútreiðslum á 38 milliónir krónur.

Rakstrarútreiðslurnar tilsamans eru 13 milliónir krónur hægri í 2010, og íløguútreiðslurnar eru 90 milliónir krónur hægri. Harumframt má nevnast, at 9 milliónir í íløgum ikki eru við í hesi viðgerð fyri 2010, tí tær verða nýttar av løgmansfyrisitingini, umframt 250.000 krónur til íløgur í 2009, sum vórðu nýttar til Løgtingið.

### Fíggjarmálaráðið

Verður hugt at fíggjarmálaráðnum, síggja vit, at ráðið hevur fingið eitt sindur størri játtan í peningi á fíggjarlógini, men ein minni part av fíggjarlógini. Ein frágreiðing til størra kostnaðin er, at útreiðslurnar til íbúðarmál eru vaksnar og inntøkurnar av tí sama eru minkaðar. Men hækkingin er lutfalsliga lítil í reiðum peningi, so talan er mest um eina framskriving av tí sama.

### Fiskimálaráðið

Hyggja vit eftir Fiskimálaráðnum, sæst, at bæði í krónum og í prosentum hevur ráðið fingið meira. Tað serliga í samband við íløgurnar, at vit síggja eina hækking hjá ráðnum, tí í inniverandi ári skuldu vera negativar íløgur, meðan tað í næsta ár sambært uppskotinum skulu nýtast 31,5 milliónir í íløgum. Harímillum er játtan til íløgu til nýtt havransóknarskip á 20 milliónir krónur komandi ár.

Samlaði raksturin í Fiskimálaráðnum skal sambært uppskotinum minka við næstan 20 milliónum krónum og hetta skal koma av, at inntøkutrygdin á 24 milliónir skal takast burtur.

### Vinnumálaráðið

Eitt av ráðunum, sum hevur mist part av fíggjarlógini er Vinnumálaráðið, ið hevur mist umleið 0,3 prosentstig av fíggjarlógini, um uppskotið verður óbroytt. Íløgurnar eru skerdar, og samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru næstan tær somu, tó eitt vet lægri. Hartil kann leggjast afturat, at rakstrarinntøkurnar skulu vaksa nógv, og meira enn rakstrarútreiðslurnar. Vit síggja eisini, at útreiðslurnar til samferðslu og samskifti eru vaksnar við næstan 100 milliónum krónum, men inntøkurnar skulu vaksa tilsvarandi.

### Mentamálaráðið

47,5 milliónir er krónutalið Mentamálaráðið